# Kjak



**Jógvan Arge**
*formaður í mentamálanevndini í Havn'*

## Starvsløn í navni William Heinesens

Tórshavnar Býráð fer á fundi hóskvøldið at taka støðu til eitt tilmæli frá síni mentamálanevnd um, at býráðið á hvørjum ári letur einum listafólki í Havnar kommunu starvsløn í eitt ár.

Mælt verður til, at hendan starvsløn verður uppkallað eftir býarins heimskenda heiðursborgara Williami Heinesen, sum gjørdi vart við seg í bókmentum, myndlist, leiklist og tónlist.

Tórshavnar býráð er kent fyri at virða tann týdning, sum eitt virkið og fjølbroytt mentanarlív hevur, og tað gera vit enn betri við eini slíkari starvsløn, sum eftir uppskotinum kann latast listafólkum á skiftandi økjum.

Í støðd verður skotið upp, at starvslønin svarar til eina læraraløn í eitt ár. Sett verður ein serkøn nevnd, sum býráðið og listafólk velja, at taka støðu til, hvør skal hava starvslønina. Ætlanin er at lata hana fyrstu ferð í 2012.

Uppskotið um William Heinesen starvslønina varð longu nevnt í einum mentanaráliti, sum Tórshavnar býráð útvegaði fyri tíggju árum síðani. Stórur partur av uppskotunum í tí álitinum eru síðani framd, men uppskotið um William Heinensen starvslønina kemur nústani ítøkiliga á býráðsins borð.

Vit ásanna samstundis, at tørvur er á einum nýggjum dagførdum mentanaráliti fyri Tórshavnar kommunu. Nógv er hent á økinum hesi árini, og nógv nýtt er undir sólini. Spurningurin um nýtt og dagført mentanarálitið kemur tí til viðgerðar í næstum.

**Gudmund Larsen**

## Til Kringvarð Føroya og Mentamálaráðið

Mín spurningur til tykkum er hesin.

Kann tað vera í ordan, at mann skal noyða eitt heilt fólk at gjalda fyri nakað, sum ongin av okkum sum búgva her í hesum landi hava ynskt? Er hetta loyvi?

Eg má siga, at hvørja ferð eg komi inn á SvF, við óvart skal sigast, stendur DR1 ella DR2 á sjónvarpsskíggjanum, og við tí, veit eg, at allar tær sendingar, havi eg, eins og 95% av øllum øðrum føroyingum longu havt møguleikan at síggja á parabolini ella Televarpinum.

Eg vildi gjarna fingið at vita frá tykkum, sum hava við SVF at gera, hvør er tað, sum ynskir hesa tænastu, tit hava at bjóða?

Mær vitandi vilja flest allir føroyingar sleppa av við at gjalda sjónvarpsgjaldið til SVF, og tað vil við øðrum orðum siga mær, í hvussu er, at ongin ynskir tykkara tænastu.

Tað sum kundi verið stuttligt, var, at SVF fór undir pay per view. Tað vil siga, at øll tey, sum vilja síggja SVF, kunna gjalda fyri tað, og øll vit, sum ikki vilja síggja SVF, sleppa undan at gjalda.

Eg vil enda hetta brævið við at siga tykkum hetta. Tíðin er farin frá tykkum. Fólkið ynskir meira enn gamlar endursendingar og sendingar, sum vit longu hava sæð á DR1 og DR2, tit hava onki at bjóða, hvørki so ella so. Sløkk.



**Rolf Guttesen**

## Hví skýggja teir Staðanavnanevndina?

Í málinum um staving og skriving av landanøvnum í komandi atlassinum, sum Skúlabókagrunnurin ætlar at geva út, hava fleiri enn eg víst á, at einasta gongda leið er at skriva soleiðis, sum londini sjálvi siga verða rætt.

Gamla heimsatlassið royndi at gera alheimsins lond 'føroysk' við at forbjóða vanligum latínskum bókstavum, sum c,q,w,x,z. Haraftrat komu royndir at arkaisera nøvn (geva teimum eitt gamalt snið), sum fyri langari tíð síða eru burturdeyð, Burgundarhólm og Líðandisnes til dømis.

### Teir svara mínum opna brævi

Eg setti Skúlabókagrunnunum tveir ítøkiligar spurningar í opnum brævi, dagfest 11. januar í ár. Annan um skipan av innihaldinum har Ísland fekk umleið 16 ferðir so nógv pláss sum Danmark. Hin um hvørjar høvuðsleiðreglur teir ætlaðu at brúka til staving av landanøvnum og øðrum staðanøvnum úti í stóru verð.

Magnus Tausen svaraði vegna Grunnin tann 18. januar. Tað ljóðaði rættiliga skilagott, soleiðis at dispostiónin við Íslandi í hásæti ikki var endalig. Men hin spurningurin um skriving av staðanøvnum fekk einki greitt svar. Uttan tað at eitt komandi Málráð skuldi viðgera tað.

### Magnus Tausen realistur viðvíkjandi skipan av innihaldinum

Í tíðindasendingini í útvarpinum hóskvøldið 20.1. kl 18 slapp eg í eini samrøðu at greiða frá málinum, og at leggja míni sjónarmið fram. Magnus Tausen fekk høvi at svara og viðmerkja. Men sama óvissa var eisini her. Dispositiónin kundi og skuldi broytast, sum rímiligt var. Men har kom einki greiðari svar um skrivimátan. Komandi Málráðið skuldi taka sær av tí. Annars høvdu teir gott fólk at spyrja.

### Men hví ræðist hann Staðanavnanevndina?

Men her manglar nakað. Tað finst ein vælmannað og virkandi Staðanavnanevnd, sum má sigast at vera tann einasta virkandi, almenna nevndin, sum hevur autoritet á einum serligum fakmálsøki: Staðanøvn, bæði í Føroyum og aðrastaðni.

Hesa nevnd vil Skúlabókagrunnurin hvørki tosa við ella um. Teir hava - í mínum samráðingum um møguligt samarbeiði - skýggjað hesa nevnd. Í tí, sum Magnus Tausen seinni hevur skrivað og sagt, hevur Staðanavnanevndi altíð verið umlopin. Teir vilja helst ikki taka Staðanavnanevndina uppá tungu. Hví?

### Hví ikki spyrja Staðanavnanevndina?

Eg bað teir, ikki bara eina ferð, men ferð eftir ferð, antin ringja, skriva ella tosa við teir, fyri at vita um Staðanevndin hevði naka principielt boð uppá leiðreglur. Eg helt, at tað var løgið ella bakvent, at Skúlabókagrunnurin ikki kundi geva mær nakrar høvuðsreglur at arbeiða eftir. Hvat produkt ynsktu teir frá mær? Men nei, tað skuldi viðgerðast seinni.

### Fram eftir fummum, ella leiðreglur?

Hví laga ein fínan garð, sum er kanska 100 metrar langur og seyðahøgur? Og so, tá tann fíni garðurin er liðugur, fáa at vita, at hann bert skuldi vera 50 metrar langur og neytahøgur (umleið hálva hædd). Nógv burturspilt arbeiði, haraftrat nógv eyka arbeiði hjá 'viðgerðarum' og øðrum at broyta og ríva niður.

### Gamla Málnevndin hevði ikki tann rætta førleikan

Henda nevnd, sum sigst at hava verið ovasti autoritetur, tá gamla atlassið skuldi gerast, hevði ongan geografiskan førleika ella ráðgeving frá kompetentum fólki, tá tað kom til skriving av nøvnum í fremmandum londum. Tað bygdi mest uppá avskriving av einum íslendskum lista. Til tíðir hava teir so viðgjørt ymsar smálutir, men ongantíð í nøkrum heildarperspektivi ella eftir yvirskipaðum princippum.

Til dømis hava teir á fundi 6. oktober 1999 samtykt at oyggin Man (partur av Stóra Bretlandi) skal skrivast Mann, "tí sjálvljóðið er stutt". Í atlassinum, sum var prentað seks ár fyrr, var tað nóg gott at skriva Man. Onnur dømir kundu verið nevnd. Men sovorðið smáputl og løtuverk uttan nakrar principiellar leiðreglur endar altíð í einum hurlivasa.

### Leiðreglur eru neyðugar, og eru ikki so torskiltar

Tað ber til at fylgja fakligum reglum. Men eisini við slíkum reglum vera ivamál – sjálvandi. Men uttan reglur verður totalt kaos.

Høvuðsreglurnar eru einfaldar:

**1:** Skriva nøvnini soleiðið, sum er vanligt í teim ymsu londunum

**2:** Loyvt er at brúka konventionell ella hevdvunnin nøvn (Keypmannahavn, Týskland)

**3:** Minkað mest møguligt um exonymir (fremmandur skrivimáti í fremmandum londum (Ikki Venedig men Venezia, ikki Grønhøvdaoyggjar men Kap Verde).

Hetta kann sigast at vera essensurin (úrdrátturin) av skjalinum við teim 11 punktunum, sum eg handaði Skúlabókagrunninum, ið segði frá mínari arbeiðsætlan. Ikki nakað,ið eg hevði uppfunnið, men tað var ein samandráttur av tí, sum fakbøkur, -nevndir og –fólk ráða til.

Men tað vildu tit í Skúlabókagrunninum slettis ikki tosa um.